Ársfrásøgn 2025 – 2026

Á Eiði fevnir dagstovnavirksemið um eina vøggustovu, tvær barnagarðsstovur, tveir frítíðarstovnar og eitt ungdómsvirksemi.

Barna- og starvsfólkatalið

Barnatalið er broytt seinasta árið. Vit eru farin frá trimum barnagarðsstovum niður í tvær og frá tveimum vøggustovum niður í eina. Samstundis er frítíðartilboðið víðkað frá einum til tveimum frítíðarstovnum. Nøkur børn eru flutt úr kommununi, meðan onnur eru flutt til kommununa

Í løtuni eru 12 børn í vøggustovuni og 22 børn í barnagarðinum í Korndalsgarði. Í Spíranum eru 28 børn í Alduni og 1. flokki, og í Læknahúsinum eru 19 børn í 2. og 3. flokki. Umleið 25 ung koma regluliga í ungdómshúsið í Læknahúsinum.

Tilsamans eru 15 ársverk á dagstovnaøkinum: 5,6 ársverk námsfrøðingar, 7,4 ársverk hjálparfólk, 1 ársverk avloysarar og 1 ársverk leiðari.

Vøggustovan hevur 3,1 ársverk umframt 0,1 ársverk til fyrireikingartíð. Barnagarðurin hevur 5,2 ársverk umframt 0,2 ársverk til fyrireikingartíð. Frítíðarstovnarnir hava 4 ársverk umframt 0,1 ársverk til fyrireikingartíð. Ungdómshúsið, sum er fyri 7.–10. flokk, hevur 0,3 ársverk. Harumframt eru stuðulstímar og húsavarðartímar.

Normering

Bygdarráðssamtykt 28. mars 2023.

Normering av barnatali

- 10 børn á vøggustovu (hægst 12)
- 14 børn á barnagarðsstovu (hægst 16)
- 33 børn í frítíðarstovn/Spírin (hægst 36)

Normering av starvsfólkatímum

Námsfrøðingar og hjálparfólk við námsfrøðiligari ábyrgd fáa harumframt 10 % fyrireikingartíð av sínum brøki. Herumframt eru stuðulstímar.

Vøggustova

Upp til 10 børn	110 tímar	(11 t. pr. barn)
11 børn	120 tímar	(10 t. fyri 11. barn)
12 børn	124 tímar	(4 t. fyri 12. barn)

Barnagarðstova

Upp til 12 børn	100 tímar	(8,3 t. pr. barn)
13 børn	110 tímar	(10 t. fyri 13. barnið)
14 børn	120 tímar	(10 t. fyri 14. barnið)
15 børn	120 tímar	(0 t. fyri 15.barnið)

16 børn	120 tímar	(0 t. fyri 16. barnið)

Frítíðarstova

Upp til 33 børn	100 tímar	(3,0 t. pr. barn)
36 børn	110 tímar	(3,0 t. pr. barn)

Námsfrøðiliga virksemið

Á námsfrøðiligum fundum umrøða vit viðkomandi mál, náms- og sernámsfrøðiligar avbjóðingar og torførar støður. Eisini fyrireika vit ráðleggingardagar og leggja til rættis samanseting av barnabólkum, umframt flyting frá vøggustovu til barnagarð. Vit royna altíð at taka hædd fyri tí einstaka barninum, barnabólkinum og aldursbýtinum, tá børn verða flutt millum stovur.

Vit hava ein námsfrøðiligan dag um árið, har vit leggja virksemisætlanina fyri komandi árið og umrøða viðkomandi faklig evnir. Í ár leggja vit dent á rørslu og heilsu alt árið, sosialar førleikar í aug/sep, skapandi evni í okt/nov, mál og samskifti í des/jan, siðir og mentan í feb/mars, náttúra, umhvørvi og tøkni í apríl/mai og persónligar førleikar í juni.

Ein spurningur, sum varð settur leiðsluni, var, hvørjar førleikavæntanir vit hava til okkara starvsfólk. Semja var um, at tað hevði verið gagnligt at lýsa væntanirnar til ávikavist avloysarar, hjálparfólk og námsfrøðingar. Leiðslan gjørdi tí eina lýsing av førleikavæntanum, sum námsfrøðiliga toymið og stovurnar síðani umrøddu, áðrenn hon varð sett í verk.

Ráðleggingardagar

Í mars varð ráðleggingardagurin brúktur til at útbúgva starvsfólkabólkin í fyrstuhjálp. Av tí at bert 16 fólk kundu luttaka á skeiðinum í senn, varð dagurin býttur í tvey. Hetta gav eisini stovunum møguleika at brúka ein part av degnum til egið fakligt arbeiði, eitt nú at gera relatiónsskjema, TRAS, arbeiða við málsetingum ella øðrum átøkum, sum stovan hevði tørv á.

Seinastu tvey árini hava vit arbeitt við evninum relatiónskompetansa. Hetta snýr seg um okkara ítøkiligu førleikar í samskiftinum við børnini: Hvat geri eg, og hvussu handli eg, tá eg eri saman við børnunum? Dugi eg at varðveita ró, vera nærverandi og bera meg rætt at, tá børn eru ørkymlað, kedd ella ill?

Í oktober verður evnið „Týdningurin av umsorganar- og læringsarbeiðinum“ á skrá á fakdegi í Varpinum í Klaksvík. Pedagogfelagið hevur fingið donsku fyrilestrarkvinnuna Emmu Holten at halda fakliga fyrilesturin.

Endamálið við luttøkuni er, at starvsfólkini fáa høvi at síggja og virðismeta týdningin av sínum námsfrøðiliga arbeiði, verða kveikt til at standa við sínum fakligu førleikum og við áræði og stoltleika kunna varpa ljós á, hvussu virðismikið námsfrøðiliga arbeiðið er.

Starvsfólkafundir

Starvsfólkafundirnir eru felags og verða hildnir umleið annanhvønn mánað. Á fundunum verður felags virksemi lagt til rættis og eftirmett. Vit umrøða viðkomandi evni, og starvsfólkini fáa eisini kunning og høvi at seta spurningar.

Seinasta árið hava vit arbeitt víðari við relatiónskompetansu. Námsfrøðingarnir og stovurnar hava skift um at hava upplegg um ymisk undirevni, umframt stovuvís bólkaarbeiði og framløgur.

Stovufundir

Hvør stova hevur stovufund umleið eina ferð um mánaðin. Á stovufundunum leggja starvsfólkini dagliga virksemið til rættis, umrøða trivnaðin hjá børnunum og starvsfólkunum og arbeiða við námsfrøðiligum spurningum í gerandisdegnum.

Eisini verða námsfrøðilig mál sett fyri barnabólkin sum heild og fyri børn, ið hava tørv á neyvum innsatsi. Stovufundirnir eru ein týðandi pallur fyri fakliga sparring, samskifti og samstarvi og eru við til at tryggja samanhang, felags fatan og støðuga menning í námsfrøðiliga arbeiðinum.

Annað

Tann 14. august 2026 fekk Korndalsgarður vitjan av starvsfólkum frá Námsvísindadeildini á Setrinum. Námsfrøðingarnir tóku ímóti og greiddu frá virkseminum á stovninum. Eisini fingu vit høvi at greiða frá okkara námsfrøðiliga grundarlagi og um, hvussu vit geva rúm fyri bæði felagsskapinum og tí einstaka barninum.

Tað var ein góð og gevandi vitjan, har vit eisini fingu høvi at tosa um ymisk faklig og áhugaverd evni.

Virksemi

Korndalsgarður

Í virksemisætlanini kunnu foreldur síggja, hvat virksemi er á skrá frá august til juli. Virksemisætlanin er tøk á Intra undir „Skjøl – foreldur“ og hongur eisini á stovunum.

Í fyrsta ársfjórðingi byrja tey elstu barnagarðsbørnini so smátt at vitja Spíran og seinni eisini forskúlan Alduna. Hetta er ein liður í fyrireikingini til, at tey skjótt skulu siga farvæl við barnagarðin og byrja eitt nýtt tíðarskeið sum forskúlabørn.

Umframt tað vanliga virksemið, sum dagligdagurin hevur við sær – eitt nú spæl, felagsløtur, túrar og ymiskar vitjanir – hava vit skipað fyri fleiri fjølbroyttum tiltøkum. Millum annað hava vit luttikið í Heystfagnaðinum, vitjað Sjóðsavnið á Argjum, havt heilsuviku og Bamsurenning, skipað fyri sjóránaradegi og havt vikuligar vitjanarløtur á sambýlinum.

Nú vit bert hava tríggjar stovur í Korndalsgarði, hava vit gjørt Rósuna til upplatingarstovu. Øll møta saman har frá kl. 7.00–8.30, og møguleiki er eisini at enda dagin saman frá kl. 15.30–17.00.

Dáin er innrættað sum eitt stillarúm, har børn saman við starvsfólki kunnu fara inn at hvíla og fáa eina sansaliga løtu. Rúmið er innrættað við dempaðum ljósum, mjúkum teppum og pútum, hugnaligum krókum og ymiskum sansamøguleikum innan ljós og ljóð.

Spírin

Dagurin í Spíranum byrjar við matarsteðgi, tá børnini koma úr skúla. Børnini eta matpakka, tosa saman og greiða frá, hvussu dagurin hevur verið. Henda løtan verður eisini brúkt til at byggja og styrkja sosialar relatiónir millum børnini.

Eftir ein skúladag hava børnini tørv á at spæla, og tey brúka dúgliga spæli-rúmini, sum nú eru gjørd meira innbjóðandi til frítt spæl. Vit leggja dent á, at børnini kunnu ganga túrar í bygdini, við vatnið, í haganum og í fjøruni, og vit geva teimum eisini møguleika at arbeiða kreativt. Framyvir ynskja vit at styrkja møguleikan fyri at taka mat við út í náttúruna.

Børnini hava havt stóra gleði av at brúka høllina, tá hon hevur verið tøk. Í vár boðaði skúlin tó frá, at vit bert kunnu brúka høllina, tá skúlatíðin er liðug. Hetta merkir, at vit nú bert kunnu brúka høllina fríggjadag frá kl. 11.30, meðan vit hinar dagarnar í fyrsta lagi kunnu koma í høllina kl. 13.30. Hetta avmarkar okkara møguleikar munandi, tí tíðin frá kl. 11.30–14.00 er tann tíðin, sum best hóskar til okkara virksemi.

Vegna nógva ferðslu á Gerðisvegi hava vit avgjørt, at børnini ikki longur kunnu spæla á vegnum. Vit arbeiða í staðin við at gera økið aftan fyri húsið meira spennandi, og í oktober verður gras lagt á vøllin, so møguleikarnir fyri bóltspæli verða betri.

At Aldan og 1. flokkur ganga í Spíranum hevur sum heild verið gott fyri børnini. Tað merkist, at ljóðstøðið er lægri, og at børnini hava fingið meira ró.

Tað er ein avbjóðing at skapa góðar karmar fyri 28 børn úr Alduni og 1. flokki. Børnini eru ung, fleiri bert fimm ára gomul, og tí er tað umráðandi at tryggja nøktandi starvsfólkaorku, so vit kunnu stuðla undir trivnaðin hjá børnunum og samstundis tryggja eitt gott og haldbært arbeiðsumhvørvi fyri starvsfólkini.

Vit arbeiða støðugt við trivnaðinum millum børnini og millum børn og vaksin. Vit leggja dent á at rúma øllum børnunum, hvussu vit møta teimum, og hvussu vit tosa um tey. Hetta er ein týðandi partur av okkara námsfrøðiliga arbeiði.

Gott foreldrasamstarv hevur eisini stóran týdning. Vit heita á foreldur um at koma inn í húsið, og vit royna at geva okkum stundir at práta við tey. Tá samstarvið millum heim og stovn er gott, eru góðar fortreytir fyri, at børnini trívast.

Tónleikastovan við Marjun Wolles hevur sum heild verið eitt stuttligt ískoyti til virksemið, hóast tað hevur verið ein avbjóðing at fanga áhugan hjá øllum børnunum. Arbeiðið steðgaði upp í vár.

Í 2026/2027 halda vit fram við at arbeiða við trivnaði og samstarvi og fara at leggja størri dent á at brúka náttúruna og nærumhvørvið. (Marianna Solvoll Landa, varaleiðari.)

Læknahúsið

Vit hava nú húsast í Læknahúsinum í eitt ár og hava lagt dent á at skapa eitt gott og støðugt grundarlag frá byrjan. Vit hava havt ein støðugan starvsfólkabólk, sum hevur arbeitt við at seta fastar mannagongdir í verk. Hetta hevur riggað væl.

Vit meta framvegis, at sundurbýtingin hevur havt jaliga ávirkan á børnini. Millum annað er betri rúm fyri, at tey elstu børnini kunnu fordjúpa seg í aldurssvarandi virksemi. Hetta eiga vit at hava í huga, tá vit einaferð flyta í nýggja frítíðarstovnin.

Seinasta hálva árið hava vit lagt dent á at skapa relatiónir og møta barninum har, tað er. Tað hevur verið sera umráðandi fyri okkum at merkja eftir, hvar børnini eru kensluliga, tá tey koma oman til okkum eftir ein skúladag.

Okkara royndir eru, at tað ikki altíð gevur meining at hava eina fasta skrá fyri dagarnar, tí skúladagarnir eru ymiskir. Vit royna tí at møta børnunum, soleiðis sum vit síggja, at tey hava tað, tá skúladagurin er av. Tí fáa børnini valmøguleikar millum útispæl og túrar, kreativitet og frítt spæl. Hetta hevur víst seg at rigga væl og gevur okkum møguleika at rúma ymiskum tørvi hjá børnunum.

Dagliga virksemið í Læknahúsinum gongur sum heild væl, tó at vit sakna eitt rúm afturat. Hóast tiltøk eru gjørd fyri at lækka ljóðstøðið, er tað framvegis høgt. Vit royna tí at býta virksemið sundur, so børnini eru ymsastaðni í húsinum og eisini úti.

Vit hava tørv á at fáa rúmið við síðuna av Lego-rúminum gjørt liðugt, so tað eisini kann brúkast. Ætlanin er millum annað at fáa sofur og annað inn í rúmið og skapa eitt róligari øki.

Vit leggja framvegis dent á at møta børnunum har, tey eru, og at styrkja relatiónirnar millum børnini og millum børn og vaksin. (Sóley Fríðheim, námsfrøðingur)

Ungdómshúsið

Síðsta árið hevur verið sera góð undirtøka fyri ungdómshúsinum. Vanliga eru millum 20 og 30 ung hvørt hóskvøld. Tey ungu ganga í 7., 8. og 9. flokki og koma úr øllum Sundalagnum.

Vit hava eina fjølbroytta skrá hvørja viku. Summi tiltøk eru smærri og onnur størri. Millum tiltøkini, sum hava verið serliga væl eydnað, kunnu nevnast Mini-OL, Heystkviss í samband við Heystfagnaðin og Halloween. Hesi tiltøkini eru eisini partur av skránni fyri heystið 2026.

Matur er eisini ein týðandi partur av tilboðnum. Vit bjóða okkurt at eta hvørt hóskvøld. Fyrr var matur á skránni eina ferð um mánaðin, men vit hava merkt, at nógv av teimum ungu koma beinleiðis frá ítrótti ella aðrari venjing og tí eru svong. Tí hava vit valt at bjóða eina heilsugóða máltíð hvørt hóskvøld. Onkuntíð er eisini kaka ella annað søtt á skránni.

Vit hava seinasta árið fingið fleiri nýggj spøl og amboð, sum hava verið væl brúkt. Vit hava fingið airhockey-borð, dartskivu og borðfótbólt. Harumframt spæla tey ungu PS5 og borðspøl og gera smúkkur og annað kreativt.

Avbjóðingar við hølunum

Ein av størstu avbjóðingunum er framvegis plássið. Vit hava ikki eitt høli, sum er okkara egna, og tí mugu vit taka atlit til frítíðarvirksemi. Hetta merkir, at leikir og onnur útgerð hjá frítíðarvirkseminum skulu flytast, og hølið skal møblerast hvørja ferð, áðrenn ungdómshúsið kann byrja. Hetta er bæði tíðarkrevjandi og avmarkar møguleikarnar fyri at skapa eitt fast og hugnaligt umhvørvi, sum tey ungu kunnu kenna sum sítt egna.

Ein onnur avbjóðing er, at ljóðstøðið ofta er høgt. Tey ungu eru ymisk, og meðan summi trívast væl við nógvum lívi, larmi og skjótleika, hava onnur tørv á einum róligari umhvørvi. Higartil hevur tað tí verið torført at fáa tey meira friðarligu ungu at taka lut, tí tilboðið í stóran mun er merkt av nógvum virksemi og høgum ljóðstøði.

Tørvur og ynski hjá teimum ungu

Tey ungu hava sjálvi sagt, at tey ynskja, at ungdómshúsið er opið tvær ferðir um vikuna. Um hetta verður gjørligt, er neyðugt at fáa fleiri starvsfólkatímar og hendur, soleiðis at vit kunnu skipa arbeiðið við einari hóskandi rotatión millum starvsfólkini. Við at tryggja nøktandi starvsfólk, kundu vit báðar dagarnar tryggja eina góða og støðuga tænastu til tey ungu.

Ein fastur og hóskandi karmur hevði givið okkum møguleika at menna tilboðið enn meira. Egin hølir hevði gjørt tað møguligt at hava ymisk virksemi – eitt øki til spøl og virksemi, eitt til kreativt arbeiði og eitt róligari øki, har tey ungu kunnu sita og práta ella bara vera.

Samanumtikið vísir stóra undirtøkan, at tørvur er á einum ungdómstilboði í økinum. Við betri hølisumstøðum og møguleika fyri at hava opið tvær ferðir um vikuna kunnu vit skapa eitt enn fjølbroyttari og meira rúmligt tilboð, sum kann fevna um fleiri av teimum ungu. (Katrin K. Sommer, námsfrøðingur)

Foreldraráðið

Nýtt felags foreldraráð varð valt á foreldraráðsfundi í oktober 2025. Ráðið skipaði seg soleiðis:

- Janni Samsonsdóttir Gutke, forkvinna og umboð fyri Læknahúsið
- Sigurd Bjørn Mørkøre, næstformaður og umboð fyri barnagarðin
- Óluva Øssursdóttir Egilstrøð, skrivari og umboð fyri vøggustovuna
- Elina Kruse, limur og umboð fyri Spíran

- Ingibjørg Hanusardóttir Reinert, limur og umboð fyri vøggustovuna
- Ólavur Høghamar, varalimur og Magnus Elison, varalimur

Foreldraráðið hevði fyrireikað árliga garðdagin at vera í Korndalsgarði tann 29. mai. Vegna veður varð dagurin útsettur. Foreldraráðið hevur ætlan um at bøta um økið uppi í bakkanum, mála ymiskt í garðinum, umvæla spælihúsið og gera tveir bensintangar.

Hølir, viðlíkahald og uttanumsøki

Nýggjur frítíðarstovnur undir Kolshjøllum

Á bygdaráðsfundinum 16. desember 2025 samtykti bygdaráðið at byggja nýggjan frítíðarstovn undir Kolshjøllum. Tað er P/F Búð, sum stendur fyri byggingini.

Upprunaliga var avtalað, at bygningurin skuldi standa liðugur í august 2027. Tíðarætlanin kann tó vísa seg at gerast meira avbjóðandi enn upprunaliga ætlað. Hinvegin fegnast vit um, at arbeiðið nú er farið í gongd, og vit gleða okkum almikið til at fáa ein nýggjan og væl úr hondum greiddan frítíðarstovn, sum lýkur neyðugu fortreytirnar fyri eitt gott, trygt og nútímans frítíðartilboð til børnini.

Í sambandi við byggingina hevur leiðslan víst á týdningin av, at leiðslan er umboðað í bygginevndini. Leiðslan hevur neyva fakkunnleika um dagliga raksturin, námsfrøðiliga arbeiðið, arbeiðsgongdirnar hjá starvsfólkunum og tørvin hjá børnunum.

Ein beinleiðis leiklutur hjá leiðsluni í byggingini kann tí tryggja, at tann vitan og tey sjónarmið, sum vóru grundarlag undir arbeiðinum við tekningum og ætlanum, eisini fylgja við í sjálvari byggingini. Hetta er við til at tryggja, at góðar og gjøgnumhugsaðar loysnir, sum stuðla undir trivnað, trygd og eitt gott frítíðarumhvørvi hjá børnunum og vaksnum, verða varðveittar. Hetta kann eisini vera við til at fyribyrgja loysnir, sum seinni vísa seg at vera óhóskandi og tí krevja umbygging ella tillagingar.

Borgarstjórin hevur játtað, at leiðslan skal vera partur av bygginevndini, og tað fegnast vit um. Enn hevur tó eingin byggifundur verið, og vit vóna, at hetta samstarvið verður sett í verk skjótt.

Vit síggja fram til eitt gott og konstruktivt samstarv um byggingina og til tann dagin, tá nýggi frítíðarstovnurin verður tikin í nýtslu – til gleði og gagns fyri børn, foreldur og starvsfólk.

Karmarnir í Læknahúsinum

Tað er enn tørvur á at bøta um ljóðstøðið og virksemiskarmarnar í Læknahúsinum og ungdómsvirkseminum. Neyðugt er at fáa eitt ella tvey høli afturat, og ynskið er, at ungdómsvirksemið kann fáa síni egnu hølir.

Vit ynskja framvegis, at kommunan setir pening av til at næsta stig í umvælingini av garðinum í Korndalsgarði. Ætlanin er millum annað at taka helvtina av reiggjunum niður fyri at skapa meira náttúruligt umhvørvi, eitt nú við einum heyggi í staðin fyri asfalt, einum størri torni og at fáa net upp, so vit hava ein lítlan bóltvøll.

Ventilatión í Korndalsgarði

Kommunan hevur tikið avgerð um, at neyðugt er at fáa eitt nýtt ventilatiónsannlegg. Annleggið er komið og verður sett upp í næstum. Vónandi verður tað sett til, áðrenn veðrið gerst kaldari.

Visjón

Næsta árið ynskja vit at seta sjóneykuna á Barnasýn, sum hongur tætt saman við okkara relatiónskompetansu og námsfrøðiliga arbeiði.

Vit ynskja at arbeiða við okkara áskoðan á barnið og okkum sjálv sum starvsfólk: Hvør eri eg sum starvsfólk, og hvør er barnið fyri mær? Hvussu síggi eg barnið, og hvussu ávirkar mín fatan og mínar handlingar tað, sum barnið møtir frá mær?

Arbeiðið snýr seg um at styrkja okkara tilvitsku um, hvussu vit síggja, skilja og møta børnum – og um at skapa eitt felags námsfrøðiligt grundarlag, har øll børn verða møtt við virðing, forvitni og áliti á teirra førleikar og møguleikar.

Endamálið er at menna eitt felags Barnasýn, sum sæst aftur í okkara relatiónum, okkara námsfrøðiligu avgerðum og í tí umhvørvi, vit skapa fyri børnini.

At enda vil eg takka foreldrum, foreldraráði, starvsfólkum, fyrisiting, politikarum og borgarstjóra fyri eitt gott og gevandi samstarv tað seinast ári.

Eiði 6. oktobur 2026

Kristina T. Larsen

Kristina T. Larsen, leiðari.